





*Hotellstsjórin peikar á nýggju høvuðsinngongdina til matstovurnar hjá Hotel Tórshavn*

*Mynd Jan Müller*

til ymsar tíðir. Her kanst tú eisini fáa eitt glas av víni, eina øl osfr. Hetta fer tó ikki at vera sum Café Nátur ella Manhattan. Opið verður frá 7 á morgni til klokkan 24 á kvøldi. Her verður eitt altjóða umhvørvi, sum øll kunnu troyta og njóta.

**Meira livandi**

–Vit gera hetta eisini út frá tí sannføring, at Vágsbotnur er ikki nóg livandi leggur hotelstjórin aftrat. Við at taka nøkur stig kunnu vit vera við til at gera hesa perluna í høvuðsstaðnum, sum Vágsbotnur er, nógv meira livandi. Tí verður henda útog umbygging ein partur av tí , og tað er eisini ein orsøk til, at vit brúka so nógva orku uppá at gera eina terassu uttanfyri hotellið, har fólk kunnu sita úti og njóta ein góðan kaffimunn ella onkran lættan rætt. Hetta skal vera við til at fáa fólk at savnast í Vágsbotni, ikki bert um summarið men sum heild alt árið.

Johannes Jensen sær fyri sær nógv meira lív í Vágsbotni næstu árini, ikki minst nú tað er býráðsins politikkur at menna alt hetta økið. – Vit halda okkum vera ein náttúrligan viðspælara og halda, at býráðið ber seg rætt at, tá tað leggur upp til at menna Vágsbotn og økið rundan um – frá Miðlahúsinum til Tjóðpallin, Margarinefarbrikkina og nú eisini Posthúskjallaran og Hotel Tórshavn. Hesi støðini fara samlað at hava nakrar synergieffektir, sum koma at broyta umhvørvið her munandi tey komandi árini. Johannes Jensen sigur seg annars vóna, at viðskiftafólkini bera yvir við teimum, nú tað er vorðið so trongligt í sambandi við umbyggingina.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 12 2006

# Yvirkapitaliserað virkir í andgletti

MARKNAÐARRÁK

Í kjalarvørrinum av søluni á væl konsolideraða TDC, hevur kjakið tikið seg upp um, hvørt íleggjarar fáa nóg mikið burturúr íløguni í yvirkapitaliseraðum fyritøkum, við jøvnum inntøkustreymum. Tað kann væntast at nevndir í fleiri donskum feløgum, eitt nú Novo Nordisk, Novozymes og Coloplast, verða hartaðar á komandi aðalfundum fyri at hava ov lítla rentuberandi skuld, við ov lítlari renting av eginpeninginum til fylgju. Um kapitalbygnaðurin á hesum feløgunum ikki verður broyttur, kunnu tey gerast áhugaverd uppkeypsevni hjá stórum íløgufondum. Um leiðslurnar hjá hesum feløgunum koma við útsøgnum um møguligar broytingar í kapitalbygnaðinum, kann hetta fáa kursirnar at hækka, just sum tað gjørdi hjá NKT í farnu viku.

**Renturnar støðugar**

Rentuhækkingin, sum hevur verið tað mesta av mars mánað, er steðgað. Enn er tó einki, sum bendir á, at renturnar fara at lækka aftur av álvara. Danska 10-ára rentan er í løtuni 3,75%. Tað kann henda, at vit fáa eina lítla rentulækking komandi vikuna, men hon varir neyvan leingi.

**Partabrøv hækka**

Seinastu vikuna eru norðurlendsk partabrøv støðugt hækkað. Svensku telefyritøkurnar Ericsson og Tele2 hava staðið fyri størstu hækkingunum við ávikavist 9,6% og 7,1%, aftaná uppmetingar og betraði útlit frá partabrævagreinarum. Topdanmark hækkaði heili 15% eftir góða roknskaparkunngerð. Hetta ávirkaði TrygVesta sum eisini hækkaði, nú sølan av sjóvátryggingum í Svøríki fekk eina góða byrjan.

**Hesa vikuna**

Hendan vikan verður friðarlig hvat viðvíkir tíðindum úr figgjarmarknaðunum. Tí fara marknaðirnir væntandi at leggja dent á millum annað oljuprísin og dollarakursin komandi vikuna.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 612,52 | -1,8% |
| JPY | 5,29 | 0,8% |
| GBP | 1.075,30 | -0,5% |
| NOK | 93,76 | 0,2% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 100,73 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 117,21 | 3,5% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*